TURKIS

MYNDIR

TRYGD

LILLA

ORÐ

Hvørjar myndir kann eg deila?

Hvat er eitt gott loyniorð?

ANSA TÆR

Hvussu skulu vit ”tosa” á netinum?

Privatir upplýsningar hvat er tað?

Kann eg vera vinur við øll?

Hvørjum kunnu foreldur hjálpa við?

VINARUMBØN

Hvør skal duga loyniorðini?

Hvønn skal eg tosa við tá okkurt er galið?

HJÁLP

APPELSINGULT

LOYNIORÐ

SIG FRÁ

GRØNT

# KRABBAGOGGAN

Krabbagággan er góð at hava saman við einum góðum práti um lívið á netinum, har nakrir viðurkennandi spurningar verða settir.

Krabbagoggan kann brúkast millum nógvar ymiskar partar. Sum dømi kunnu nevnast: børn svara børnum, ung svara børnum, børn svara ungum, børn svara foreldrum, foreldur svara børnum osfr.

## HVUSSU FALDAR TÚ KRABBAGÁGGUNA?

1. Legg hesa síðuna (baksíðuna) av Krabbagágguni uppeftir.
2. Falda tey fýra hornini inn móti miðjuni, so tey koma saman.
3. Vend Krabbagágguni við, so tú sært teir átta spurningarnar?
4. Falda aftur tey fýra hornini inn móti miðjuni.
5. Falda nú Krabbagágguna um miðjuna, so hon verður til ein lítlan rætthyrning.
6. Sting fingrarnar inn í teir fýra "lummarnar" á Krabbagágguni.
7. Nú er Krabbagággan klár at brúka.

## HVUSSU SPÆLA TIT VIÐ KRABBAGÁGGUNI?

1. Halt Krabbagágguna saman, so vit bara síggja teir fýra littu partarnar.
2. Bið síðumannin um at velja ein lit.
3. Vend nú so nógvar ferðir, at tað svarar til talið á bókstavum í litinum.
4. Bið síðan síðumannin um at venja eitt av orðunum, ið síggjast inni í Krabbagágguni.
5. Vend síðan aftur so nógvar ferðir, at tað svarar til talið á bókstavum í orðinum.
6. Bið nú síðumannin – fyri seinastu ferð – um at velja eitt orð.
7. Lyft nú klaffin upp, og spyr spurningin, ið stendur undir orðinum, sum varð valt.

FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

SSP